Felagið Føroysk Ross

# Formansfrágreiðing 2023

*"Eitt felag í vøkstri"*

Vøkstur eru grundarlagið fyri sprettu og úrtøku. Verður hjúklað um og røktað væl, so blómar. Tað, ið blómar, dregur at sær og skapar lív. Tað er fagurt, og er grundarlagið fyri trivnaði og eini ringrás, sum er burðardygg.

Felagið Føroysk Ross er í vøkstri. Grundarlag er fyri úrtøku. Nú ræður um at lata felagið blóma. Skapa lív og trivnað. Hjúkla um áhugan fyri føroyska rossinum. Vísa á góðu eginleikarnar rossið hevur.

Eins og man kann lata gras grógva, sláa tað og framleiða fóður úr tí, so nyttar tað lítið, um man hvørki hevur goymslupláss til fóðrið ella krýatúr at fóðra. Vit kundu sagtans framleitt fleiri føroysk ross í Føroyum, men hvat nyttar tað, um vit ikki hava nokk av goymsluplássum til tey ella ov fá fólk at fáa nyttu úr teimum. Føroyar eru lítlar. Sundurbýting er á høgum og stikini eru mong, ið avmarkar lívskorini hjá krýatúrum. Fá fólk eiga jørð og/ella fjós.

Felagið vil fegið gera sín part. Felagið vil fegið blóma og síggja at úrtøkan verður heystað. Felagið hevur heitt á landsins myndugleikar um at koma við amboðunum, so gongd kann koma á framleiðsluna.

Tað, ið felagið "sáddi" við í 2022 var:

- Vognskeið var í apríl.
- Almenn hugnaløta/fyrilestur var í Havnardali í samband við vognskeiðið.
- Luttóku á Djóradøgum hjá Føroya Ríðingarfelag.
- Ross vórðu flutt úr Mykinesi og fingu nýggj heim.
- Tóku ábyrgd fyri aliætlan og hjálptu við paringum.
- Fylini vórðu chipmerkt og DNA testaði.
- Ryssur fóru til greðing.
- Nógv ross vórðu testaði fyri DMRT3.
- Luttóku á ólavsøku.
- Harriet varð sett í starv av taka sær av sosialum miðlum/marknaðarføring.
- Harriet fór á fund við Visit Faroe Islands vegna felagið.
- Harriet gjørdi plakat av føroyskum rossi til løgtingsvalið, og eftir valið fingu politikararnir faldara.
- Luttóku á NordGen, Native Horse Network, fundi í Svøríki.
- Samskiftu við NordGen um verkætlanina at taka sáð og egg úr føroyskum rossum.
- Verkætlanar umsókn varð latin Búnaðarstovuni – játtað í 2023.

- Samskiftu við Búnaðarstovuna og UVMR um greðingamiðstøð.
- Samskiftu við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um útflutningsmálið.
- Samskiftu við serfrøðingar um embryo verkætlan.
- Søktu um hægri játtan á Fíggjarlógini – Fíggjarnevndin legði fram álit at hækka játtanina hjá felagnum við 50 tús. kr., og at finna loysnir fyri føroyska rossið. Álitið bleiv samtykt við 2. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum. Fíggjarlógin bleiv einmælt samtykt við 3. viðgerð í dag. Fíggjarlógin er ikki løgd alment út enn, men felagið kann rokna við eini játtan á 150 tús. kr. á Fíggjarlógini, ið eru oyramerktar til felagið.
- Klárt er at leggja heimildarlista inn á heimasíðuna hjá felagnum.
- PolarFilms framleiddi stuttfilm/reklamufilm til felagið.
- Gongd kom á dokumentarin í samstarvi við PolarFilms og Høgna Mohr.
- Umsókn um filmsstuðul varð latin Mentamálaráðnum í januar 2023.
- Jólamyndakapping var á Facebook.
- Samskiftu við Cécile og onnur myndatøkufólk at taka myndir í 2023.
- Samskiftu við Festivalhøll um luttøku á Víkingafestivalinum 2023.
- Byrjaðu fyrireikan av myndakalendara 2024. Samskiftu við føroysk myndatøkufólk.

Vit kunnu bara heysta, um vit sáa. Nógv hevur verið á skránni, men tað er ikki altíð rætt at sáa nógv fyri at heysta nógv. Tað gevur betri úrtøku at sáa við rætta tilfarinum og røttu mongdini. ”Quality vs quantity”, sum verður sagt á enskum. Tað er í lagi, um tað onkur ár verða færri ting á skránni, og dentur lagdur á at gera tað væl, sum skal raðfestast. Umráðandi er at vísa hvørjum øðrum álit og virðing, so arbeiðsgongdin verður ótarnað og arbeiðshugurin stimbraður.

Onnur tamd dýrasløg eru ald til teirra serkønu og vældámdu eginleikar. Føroyar eiga at leggja sítt til, at ala dýrasløg við eginleikum, sum tørvur og eftirspurningur er/verður á. Føroyska rossið hevur ikki verið alt, og enn kunnu vit ikki ala málrættað. Vit eiga at fylgja vegleiðingini frá serfrøðingum, og vit eiga at vísa øðrum á, at føroyska rossið hevur sítt fullgilda virði, hóast tað ikki er alt enn.

Nú eg fari frá, sum forkvinna í felagnum, til eg fyrst takka fyri samstarvið og vælviljan, sum mær hevur verið vístur, og síðan heita á ein og hvønn, ið leggur í náttúruna, dýralívið og lívfrøðiligt margfeldi, at eftir førimuni gera tað tey kunnu, veri tað seg jalig umtala ella ein hjálpandi hond, so framtíðin hjá føroyska rossinum verður opin og bjørt.

Yvirskriftin fyri formansfrágreiðingina í ár er ”Eitt felag í vøkstri”. Latið okkum arbeiða fyri, at yvirskriftin í framtíðini verður ”Eitt felag, ið blómar”.

Jóna Adelaide Ólavsdóttir

Forkvinna í Felagnum Føroysk Ross